# Samgonguveljararnir vilja hava blokkin burtur

*Veljaraknaningin hjá Sosialinum og Sjónvarpinum vøisir, at tað serliga eru veljararnir hjá samgonguni, sum vilja hava ríkisveitingina burtur*




*Í veljarakanningini vóru fleiri fyri, at blokkurin skal takast burtur, enn tað vóru ímóti*

SVEINUR TRÓNDARSON

Veljarakanningin hjá Sosialinum og Sjónvarpinum gav ábeindingar um, at tað eru fleiri føroyingar sum eru fyri, at ríkisveitingin verður burturtikin, enn tað eru, sum eru ímóti. Kanningin vísti, at 47,5 prosent eru fyri, at ríkisveitingin verður burturtikin, meðan góð 46 prosent eru ímóti.

Verður hugt nærri eftir floksbýtinum hjá veljarunum, so sæst, at tað eru veljararnir hjá samgonguni, sum eru fyri at ríkisveitingin fellur burtur, meðan veljararnir hjá andstøðuni siga, Miðflokkurin ikki íroknaður, siga, at tað ikki er ráðiligt, at ríkisveitingin verður tikin av.

### Minst í Fólkaflokkinum

Tað er í Fólkaflokkinum, at undirtøkan fyri avtøku av ríkisveitingini er minst. Gamaní er ein meiriluti av veljarum Fólkafloksins fyri, at blokkurin verður søgaman býti sigur, at 55 prosent av veljarum floksins eru fyri, meðan 38 prosent eru ímóti.

Hesi tøl siga, at tað kanska ikki er so stórur áhugi í Fólkaflokkinum fyri, at avtaka blokkin, men tað er ikki so langt av leið, tá hugsað verður um, at triði hvør veljari hjá Fólkaflokkinum er ímóti at skipa Føroyar sum fullveldi.

Hinvegin kann so sigast, at tað í Fólkaflokkinum er eins stór undirtøka fyri fullveldinum og fyri at blokkurin verður avtikin.

Í Sjálvstýrisflokkinum eru fleiri veljarar fyri, at føroyingar skulu klára seg uttan danskar pengar. Har eru góð 62 prosent fyri, at ríkisveitingin fellur burtur, meðan 27 prosent siga, at tað ikki er rætt, at blokkurin verður avtikin.

Tað er kortini í Tjóðveldisflokkinum at undirtøkan fyri avtøku av blokkinum er størst, og tað ger neyvan nakran bilsnan. Her siga góð 83 prosent, at danir sjálvir kunnu hava sín pening. Tað, sum kortini kann tykjast løgið er, at góð 12 prosent av veljarunum hjá Tjóðveldisflokkinum ikki vilja av við blokkstuðulin.

### Andstøðan vil hava ríkisveiting

Sum vera mann, eru veljararnir hjá andstøðuni ikki serliga glaðir fyri, at geva avkall upp á donsku ríkisveitingina, skulu vit trúgva veljarakanningini.

Veljararnir hjá Sambandsflokkinum og Javnaðarflokkinum eru teir, sum vilja varveita donsku ríkisveitingina. Býtið er soleiðis háttað, at knappliga 74 prosent av sambandsveljarunum og knappliga 67 prsent av veljarum Javnaðarfloksins hava sagt, at tey ikki vilja av við donsku ríkisveitingina.

Henda støða kann neyvan gera nakran bilsnan og hon hongur eisini væl saman við hvussu veljararnir hjá hesum flokkum hava svarað í fullveldisspurninginum. Í hesum báðum andstøðuflokkunum er meiriluti ímóti at skipa Føroyar sum fullveldi, og tí er tað ikki at undrast á, at veljararnir hjá hesum flokkum eisini vilja varðveita ríkisveitingina.

Seinasti flokkurin í andstøðuni er Miðflokkurin og veljararnir hjá honum – um enn teir ikki eru so nógvir í tali – liggja tættari upp at samgonguni enn andstøðuni. Goð 54 prosent siga, at tey vilja av við blokkin meðan 41 prosent vil halda fast við blokkin.

### Einki óvanligt

Í stuttum kann sigast, at tað ikki er nakað óvanligt í teimum tølum, sum vit hava víst á omanfyri.

At tað millum fólkafloksveljarar ikki er størri munur á teimum sum vilja av við blokkin og teimum, sum vilja varðveita hann, er nokk bara eitt tekin um, at tað eru ikki allir fólkafloksveljararnir, sum eru fyri fullveldinum og tí heldur ikki vilja av við ríkisveitingina.

Í Sambandsflokkinum og í Tjóðveldisflokkinum er støðan tann greiðasta um tað kortini ikki øll eru ímóti í Sambandsflokkinum og øll fyri í Tjóðveldisflokkinum. Hetta kann tulkast at tað t. d. millum tjóðveldisveljarar eisini finnast fólk, sum vilja hava fullveldið uttan at gjalda fyri tað sjálvi.

Hinvegin kann tað tykjast meira løgið, at næstan triði hvør javnaðarveljari vil varðveita blokkstuðulin, tí tað er ímóti stevnuskránni hjá flokkinum og eisini ímóti tí, sum flokkurin hevur greitt frá, í sambandi við sjálvstýrisuppskoti. Har vísir flokkurin nevniliga á, at eisini hann fegin vil av við blokkstuðulin.

*Meta tygum, at tað er best, at blokkurin verður tikin burtur?*

| Talva | Ja | Nei | Veit ikki |
|---|---|---|---|
| Fólkaflokkurin | 55,2 | 38,1 | 6,7 |
| Sambandsflokkurin | 18,0 | 73,8 | 8,1 |
| Javnaðarflokkurin | 29,2 | 66,7 | 4,1 |
| Sjálvstýrisflokkurin | 62,1 | 27,6 | 10,3 |
| Tjóðveldisflokkurin | 83,4 | 12,3 | 4,3 |
| Miðflokkurin | 54,5 | 40,9 | 4,5 |
| Blankt | 75,0 | 25,0 | 0,0 |
| Fari ikki á val | 56,2 | 31,2 | 12,5 |

# Fimti hvør sambandveljari vil hava fullveldi

*Veljarakanningin, sum var gjørd í síðstu viku vísir, at hóast stóru meiriluti av sambandsveljarunum er ímóti fullveldinum, so er kortini fimti hvør veljari fyri at Føroyar gerast fullveldi eftir leisti landsstýrisins*




*Veljarakanningin vísit, at 1% feliri veljarar eru fyri, at Føroyar verða skipaðar sum fullveldi eftir leistinum hjá landsstýrinum, enn tað vóru ímóti, ávikavist 46,2% og 45,2%*

SVEINUR TRÓNDARSON

Veljarakanningin, sum var gjørd í seinastu viku vísti, at ein lítil meiriluti var fyri, at Føroyar verða skipaðar, sum fullveldi eftir tí leisti, sum landsstýrið arbeiðir eftir, og tað merkir, at vit skulu hava sama kong, sum danir, og við sama gjaldoyra sum danir. Kanningin vísti, at 46,2 prosent av veljarunum vóru fyri, at skipa Føroyar sum fullveldi, meðan 45,2 prosent eru ímóti.

Ikki stórur munur — einans tað eina prosentið, men kortini fleiri fyri enn ímóti.

### Fimti hvør andstøðuveljari fyri

Hyggja vit eftir, hvussu veljararnir, sum eu fyri fullveldinum eru bólkaðir í flokkar, so kemur fram ein áhugaverd mynd. Hon vísir, at undirtøkan sjálvsagt er størst í Tjóðveldisflokkinum og eins minst í Sambandsflokkinum.

Tað er í sær sjálvum ikki tað stóra at undrast á, men tað sum hinvegin kann tykjast merkisvert er, at í teimum báðum andstøðuflokkunum er fimti hvør veljari fyri fullveldi eftir leisti landsstýrisins.

At ein partur av Javn-aðarveljarunum er fyri fullveldi er neyvan heldur nakað, sum undrar, tí tað hevur leingi verið kent, at ein fittur partur av javnaðarveljarunum ikki eru á einum máli við flokkin í fullveldisspurninginum. Harafturat er tað ikki fyrr enn í seinastuni, at flokkurin heilt greitt hevur sagt, at hann er ímóti samgonguni.

Hinvegin undrar tað ikki sørt, at fimti veljari hjá Sambandsflokkinum tekur undir við samgonguni. Hetta er eitt lutfalsliga stórt tal, tí hóast Sambandsflokkurin í longri tí ikki var serliga glaður fyri at tosa um broytingar í ríkisfelagsskapinum, so kom hann kortini við einum útspæli, sum hevði við sær broytingar.

Tí kann ábendingin frá teimum 20 prosentunum, sum siga seg taka undir við fullveldinum, vera boð um, at tey vilja hava meira víðgongdar broytingar — hóast tey eru sambandsfólk og tað sama ger seg galdandi við veljarunum hjá Javnaðarflokkinum.

### Enn nógv ímóti

Hinvegin hava samgonguflokkarnir úr at gera við at greiða teirra egnu veljarum frá, hvussu støðan er og hvat landsstýrið er í holt við.

Serliga í Fólkaflokkinum og í Sjálvstýrisflokkinum eru nógv, sum enn ikki taka undir við fullveldisætlanini hjá landsstýrinum og tí grundini er tað merkisvert hvussu nógv tey eru sambært hesi veljarakanningini. Tí her skulu vit hav í huga, at Fólkaflokkurin, sambært kanningini hevur mist nógvar veljarar og tað eru neyvan tey, sum eru fyri fullveldinum, sum eru farin.

Í Fólkaflokkinum og í Sjálvstýrisflokkinum er undirtøkan bara góð 55 prosent, meðan tey, sum eru ímóti eru ávikavist 34,3 prosent og 44,8 prosent.

Formaðurin í Tjóðveldisflokkinum, Heini O. Heinesen, segði við Sosialin í seinastu viku, at hann var stak fegin av tí undirtøku fullveldismálið fekk í veljarakanningini, tí landsstýrisflokkarnir hava í veruleikanum einki kunningararbeiði gjørt, fyria t fáa fólk til at taka undir við uppskotinum. Hetta er bara partvíst rætt, tí landsstýrið hevur hóast alt verið runt landið og kunnað fólk um Hvítubók.

*Taka tygum undir við, at Føroyar verða skipaðar sum fullveldis ríki?*

| Talva | Ja | Nei ikki | Veit |
|---|---|---|---|
| Fólkaflokkurin | 55,2 | 34,3 | 10,5 |
| Sambandsflokkurin | 20,3 | 72,1 | 7,6 |
| Javnaðarflokkurin | 22,3 | 69,0 | 8,6 |
| Sjálvstýrisflokkurin | 55,2 | 44,8 | 0,0 |
| Tjóðveldisflokkurin | 84,4 | 9,4 | 6,1 |
| Miðflokkurin | 45,5 | 27,3 | 27,3 |
| Blankt | 25,0 | 25,0 | 50,0 |
| Fari ikki á val | 43,8 | 37,5 | 18,8 |



# Frægari arbeiðsumhvørvi

*Arbeiðsumhvørvisráðið hevur havt lógina, sum galdandi er í Grønlandi um arbeiðsumhvørvi, sum grundarlag fyri nýggja lógaruppskotinum um arbeiðsumhvørvislóg*

ÓLAVUR Í BEITI

Finnbogi Arge hevur lagt uppskot fram um arbeiðsumhvørvislóg, og sigur hann enda-máli við uppskotinum verða, at virka fyri einum tryggum og heilsugóðum arbeiðsumhvørvi, sum altíð er í samljóði við teknisku og sosialu gongdina í samfelagnum. Eisini skal lógin skapa grundarlag fyri, at virkini sjálvi kunnu loysa sínar trygdar- og heilsuspurningar eftir vegleiðing og í samstarvi við feløgini á arbeiðsmarknaðinum og við vegleiðing og undir eftirliti av Arbeiðseftirlitinum.

Í viðmerkingunum verður upplýst, at landsstýrið heitti í 1988 á Arbeiðsumhvørvisráðið um at koma við uppskoti til nýggja lóg um arbeiðsumhvørvi. Síðan vórðu hildnir 12 fundir, og hevur Arbeiðsumhvørvisráðið á fundi 12. desember 1990 gjørt endaligt tilmæli um nýggja arbeiðsumhvørvislóg, aftaná at uppskotið hevði verið til umrøðu hjá øllum vinnufeløgum, stovnum og kommunum. Henda lóg skal avloysa lóg um arbeiðaravernd, sum kom í gildi 1. januar 1975.

### Grønlendska lógin fyrimynd

– Í 1988 álegði landsstýrismaðurin Arbeiðsumhvørvisráðnum at gera eitt fullfíggjað uppskot til eina tíðarhóskandi arbeiðsumhvørvislóg fyri Føroyar. Hetta varð gjørt, og uppskotið varð sent kommunum, stovnum og øllum vinnufeløgum (bæði arbeiðsgevara- og løntakarafeløgum) til ummælis. Ráðið hevur havt lógina, sum galdandi er í Grønlandi um arbeiðsumhvørvi, sum grundarlag fyri hesum lógaruppskoti, sigur Finnbogi Arge í viðmerkingunum.

Og um orsøkina til, at henda lóg er nýtt sum fyrimynd fyri føroyska lógaruppskotinum, sigur landsstýrismaðurin, at ráðið metir umstøðurnar og viðurskiftini annars í Føroyum og Grønlandi vera so lík, at stórir partar av grønlendsku lógini eisini hóskar til okkara viðurskifti.

– Ráðið hevur eisini kannað rættarstøðuna í hinum grannalondum okkara, og hevur orðaskifti verið um ymsar reglur, sum galdandi vóru í hesum londum, og um tær áttu at verið settar í gildi í Føroyum eisini. Høvuðsendamálið hjá ráðnum hevur tó verið at fáa eina lóg, sum er lagað til tey serføroysku viðurskiftini, og hevur ráðið gjørt endaliga uppskot sítt út frá hesum sjónarmiði.

### Stórur munur

– Munurin millum hetta lógaruppskot og arbeiðaraverndarlógina er stórur. Arbeiðaraverndarlógin hevur grundarlag í vernd móti vandamiklum maskinum. Í dag fevnir arbeiðsumhvørvi um vælferð, fyribyrging, best møguliga skipan av arbeiði út um vernd móti vandamiklum maskinum.

– Ein annar avgerandi munur er, at við hesum lógaruppskotinum verður allur arbeiðsmarknaðurin - hin almenni og hin privati – javnsettur. Í praksis vísir tað seg nevniliga so, at tá tað snýr seg um privatar arbeiðsgevarar, ið ikki halda seg til galdandi lógarkrøv, so verða hesir sektaðir við bót ella hefti. Er tað hinvegin ein almennur arbeiðsgevari, ið fremur sama lógarbrot, so gongur hesin fríur, tí eingin heimild er í galdandi lóg at sekta hesar, sigur Finnbogi Arge.

### Oljuídnaðurin við

Og nýggja lógin hevur eisini oljuna við, og sigur Finnbogi Arge, at um oljuídnaður verður framtíðin, verður tað eisini neyðugt við einum nútímans lóggávu innan arbeiðsumhvørvisøkið, eins og tað er ein fyrimunur, at lóggávurnar líkjast teimum í grannalondunum.

Landsstýsmaðurin metir ikki, at lógaruppskotið í sjálvum sær hevur eyka fyrisitingarligan kostnað við sær. Heldur ikki verður mett, at uppskotið kemur at hava við sær meirútreiðslur fyri privata arbeiðsmarknaðin.

SKEIÐSTOVAN KVASiR FARODANE



Nýggj skeiðtænasta frá Farodane í eksklusivum umhvørvi

Sum liður í meginregluni: at vera fullfíggjaður heildarveitari á sínum øki, fer Farodane í næstum undir skeiðtænastu við fjølbroyttum úrvali og í eksklusivum umhvørvi. Talan verður bæði um traditionell skeið, sum t.d. teldukoyrikortið, og serskeið, m.a. innan grafisk forrit og internetið

TELDUKOYRIKORT
Teldukoyrikortið er evropeiskt prógv, sum er grundað á góðkendan KT-førleika. Ein førleika, sum prógvar at luttakarin hevur staðið sjey royndir í nýtslu av teldu og mest vanligu forritunum.
Teldukoyrikortið er grundað á royndir innan tey sjey fakøkini, sum eru mest umráðandi sambært KT-krøvunum í upplýsingarsamfelagnum í dag.
Royndirnar kunna takast á royndardepli, sum er góðkendur av Dansk dataforening. **Skeiðstovan Kvasir** er góðkendur royndardepil.
Tá næmingurin hevur staðið fyrstu royndina av teim sjey, fær næmingurin eitt **Skills Card**, sum vísir nær og hvønn part av teldukoyrikortinum næmingurin hevur staðið.
Tá ein hevur staðið allar sjey royndirnar, fær ein teldukoyrikortið.
Fyrsta skeiðið byrjar 4. apríl

NAVISION
Saman við **Vision Software** verður skipað fyri frálæru innan **Navision** og **Navision Financials**.
Um ynskist er einki til hindurs fyri, at vit skipa fyri øðrum skeiðum, so sum:
- Serskeið til júst tygara fyritøku
- Skeið innan ávísar serskipanir
- Einstaklingaskeið fyri brúkarar og meistarabrúkarar

Skeiðleiðarar okkara hava allir holla roknsskaparliga vitan eins og teir eisini hava kunnleika til fyrisiting í breiðari merking.
Fyrsta skeiðið byrjar 6. apríl

DTP-SKEIÐ
Skeiðið fevnir um frálæru í grundleggjandi vitan innan typografi, layout, myndaviðgerð, skanning, tekning og brúki av illustratiónum og litum. DTP-koyrikortið er ein væl tilrættaløgd gongd fyri nýggjar DTP-brúkarar á virkjum,sum ætla at byrja uppá lutvísa innanhýsis framleiðslu ella sum ein hjálp í samskiftinum við lýsingastovur, prentsmiðjur og aðrar grafiskar fyritøkur, tá prentlutir o.a. skulu leggjast til rættis ella framleiðast. Alt ræður jú um at byrja rætt og taka røttu avgerðina um, hvussu langt ein sjálvur skal vera við í framleiðsluni frá hugskoti til liðnan prentlut v.m.

DTP-skeiðini eru hesi:
1. Adobe PHOTOSHOP
2. Adobe INDESIGN
3. Adobe ACROBAT
4. KLÁRT TIL PRENT
5. Adobe ILLUSTRATOR
Fyrsta skeiðið byrjar 10. apríl

WEB-SKEIÐ
Tað koma støðugt fleiri forrit á marknaðin til at viðgera, byggja upp og broyta heimasíður.
Vit hava valt at seta saman eitt WEB-Koyrikort, sum fevnir um nøkur av teimum best umtóktu forritunum innan WEB-design.

WEB-skeiðini eru hesi:
1. Adobe GOLIVE
2. Adobe IMAGEREADY
3. Macromedia FLASH
4. Adobe ACROBAT
5. KLÁRT TIL INTERNET
Fyrsta skeiðið byrjar 3. apríl

ACROBAT/PDF SKEIÐ
Acrobat og PDF verða sera nógv umtalað í løtuni.
PDF-formátið verður góðkent á støðugt fleiri støðum sum skjalaviðgerðarformát. Tað vil siga, at skjalaviðgerð og skjalaflutningur gjøgnum internetið og sum elektroniskur "prentlutur" v.m. hevur PDF sum fíl-formát.
Fyrsta skeiðið byrjar 12. apríl



TILMELDING á heimasíðu okkara:
kvasir.farodane.fo
- ella ringið tlf. 211861 ella 311414. e-mail:
kvasir@farodane.fo



fd-3-00

SKEIÐSTOVAN KVASiR FARODANE

SKOTARÓK 14 • 100 TÓRSHAVN • TLF. 211861 og 311414 • FAX 317534